## Keðiligt og tó hjá Atla

Atli Danielsen kundi um vikuskiftið gleðast um, at hann endiliga var komin fyri seg aftur, eftir at hava sitið uttanfyri við skaða seinastu tríggjar dystirnar. Klaksvíkingurin byrjaði inni í dystinum móti Skive í gjár og spældi allan dystin á tamb. Hinvegin kundi hann saman við liðfeløgunum harmast um, at FC Roskilde tapti annan dystin á rað. Skive vann nevniliga dystin 1-0 og harvið er triðja tapið hjá FC Roskilde í vár veruleiki. Samstundis, sum tað ikki hevur gingið eftir vild hjá teimum teir báðar seinastu dystirnar, hava hini liðini kring FC Roskilde fingið stig. Tað merkir, at FC Roskilde nú einans er trý stig omanfyri niðurflytingarmarkið nú einans fimm dystir eru eftir at spæla.

## Frem vann uttan føroyingar

Seks dystir hevði Frem spælt uttan at hava vunnið ein einasta av hesum. Tað var støðan undan dystinum móti Skive í gjár, og tað merkti eisini, at møguleikarnir hjá Frem fyri at yvirliva í næstbestu donsku deildini, eru minkaðir niður í næstan einki. Í gjár fingu tey tó okkurt at gleðast um í Valby, tí fyri fyrstu ferð í meira enn ein mánað eydnaðist tað Frem at vinna ein dyst. Hetta gjørdu tey við at basa Skive 0-1 á útivølli. Sæð við føroyskum brillum var tó lítið at frøast um. Eingin føroyingur var á vøllinum í sigrinum í gjár, har Bogi Løkin sum tann einasti av okkara landsmonnum, sat á beinkinum. Fimm dystir eru eftir at leika í donsku 1. deild og sum støðan er nú, hevur Frem sjey stig upp um markið.




*Liðskiparin og verjukempan hjá fuglfirðingum, Poul Ennigarð, setur her íslendska Þórður Heiðarsson hjá HB uppá pláss*
*Mynd: Álvur Haraldsen*